## Annika ikki við næsta ár

Annika Thomsen, sum síðstu tvey árini hevur verið ein góður styrkur hjá Tjaldri, sum í fjør vann meistaraheitið og í ár mátti taka til takkar við silvurinum, heldur ikki fram í Runavík komandi kappingarár. Eftir seinnu FM-finaluna ímóti Stjørnuni ásannaði Annika, at tað er ov møtimikið at koyra millum Hoyvík og Runavík fleiri ferðir um vikuna, so tí gevst hon. – Hetta hava verið tvey góð ár, men hvar eg endi komandi kappingarár, havi eg ikki tikið avgerð um enn, sigur hon.



## 40 gentur til venjing

Tilsamans 40 gentur í aldri millum 13 og 15 ár vóru leygarmorgunin møttar til eina stóra venjing í Gundadalshøllini. Talan var um bestu spælarar í landinum í hesum aldrinum, og var hetta fyrst U14-venjingin í hesum umfari. Venjarar eru Kári Horn og Birgir Poulsen, og ætlanin er, at teir regluliga skulu savna ungu spælararnar til venjingar.

# SÍ skrivaði søgu

**Onkur feløg hava vunnið greipuna við kvinnum ella monnum og so annaðhvørt meistaraheitið ella steypakappingina við hinum, men ongantíð áður hevur nakað gjørt slætt borð, sum SÍ hevur gjørt tað hesa ferð, og tikið alt, sum takast kann**



einstistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen



Meginparturin av spælarunum á bæði kvinnu- og mansliðnum hjá SÍ avmyndað eftir FM-sigurin hjá monnunum. **Aftast frá høgru:** Elias Davidsen, Jákup á Kák, Jón Falkvard, Finn Ingi Falkvard, Ragnar í Haraldsstovu, Ingi Ole-Jacobsen, Raiko Petrovic, Ólavur Jensen, Sonni Zachariasen, Emil Mikkelsen, Johan Petur á Stongum, Jákup Hansen, Filip Gram, Kári Mikkelsen og Jón Joensen. **Mittasta raðið:** Annika á Stongum, Hervør Hansen, Annika Niclasen, Vivian Joensen, Karin Mikkelsen og Gunnleyg Joensen. **Sitandi fremst:** Heidi Christiansen, Tórfríð Tavsen og Helga Guttesen

Mynd: Álvur Haraldsen

Beint eftir dystin fingu vit orðið á tveir mans, ið vóru hvør fegnari enn annar. Jákup á Stongum er vælsaktans tað, vit kunnu rópa Mister SÍ, og Suni Jacobsen er borgarstjóri í Sørvági, men hevur eisini verið nógv við í flogbóltinum.

– Hetta er nokk so stuttligt, tí eg minnist, at tí 2003 ella 2004, tá Raiko og teir komu, so segði eg við Suna, at vit um fýra ár skuldu upp í meistaradeildina við kvinnunum, og so um fýra ár skuldu vit vinna hana, segði Jákup á Stongum.

– Ja, eg minnist hatta. Vit vóru eitt sindur ivasamir, tá Raiko og Borko komu, men samstundis vóru vit vóru sannførd um, at teir skuldu lyfta nakað meira, leggur Suni Jacobsen aftrat.

Jákup sigur, at umráðandi var hjá SÍ tá, at ikki bara skuldi venjari fáast til menninar, men eisini til kvinnurnar, og nú kann SÍ heysta fruktirnar av tí.

– Raiko kom at læra kvinnurnar at spæla flogbólt. Tá vóru tær í 2. deild, haldi eg, og tær dugdu yvirhøvur ikki at spæla flogbólt. Men nú er annað lagið, sigur Jákup, sum ikki hevði væntað, at triðja FM-finalan hjá SÍ skuldi verða avgjørd við trimum settum, hóast hann hevði roknað við sigrinum.

– Nei, eg skal ikki siga, at eg hevði roknað við, at vit fóru at vinna 3-0. Men síðsta sunnudag vóru einir tríggir mans, sum vóru sera móðir, og tað væntaði eg, at vit fingu upp á pláss til í dag. Hetta var allíkavæl ein tættur dystur, har bæði tey fyrstu settini kundu farið báðar vegir. Og tað var stuttligt at síggja tað psykologiska í tí, at í triðja setti vildu SÍ-menninir bara vinna her og nú, fyri at fáa tað yvirstaðið, sigur Jákup á Stongum.

– Ja, eg má viðganga, at eg hevði roknað við einum fimmsettara í dag, men okkara spældu nógv betri. Hetta er ein fantastisk kensla, tí hetta hevur jú verið so strævið við trimum dystum, sigur Súni, ið serliga hevur hug at nevna Emil Mikkelsen, sum er ein av teimum yngru spælarunum á liðnum:

– Tað var ótrúligt at síggja ein spælara sum Emil, sigur hann, samstundis sum Jákup supplerar og nevnir Kára Mikkelsen, sum kom inn fyri Raiko í fyrsta setti og broytti tað heila: – Kári spældi sín besta dyst í dag, og Emil suverenur í triðja setti, sigur Jákup.

# Johan Petur og Kári vóru við í báðum

Johan Petur á Stongum var kanska tann, ið hevði størstu orsøkina til at smílast um alt andlitið, tí tá hann við monnunum leygardagin vann meistaraheitið, hevði hann fingið tvey gullheiðursmerki í Eik-liguni, eitt hjá monnum og eitt hjá kvinnum, har hann er venjari. Somuleiðis hevur hann tvey gullmerki, tí hann á sama hátt vann steypakappingina við báðum liðum.

– Kenslan er heilt fantastiskt, nú vit eru fyrsta felag, sum kann vinna alt, sum vinnast kann. Nú hava vit skrivað søgu, og tað er heilt ótrúligt, segði Johan Petur, sum var heldur eyðmjúkur, tá vit spurdu hann, um hann nú orkaði at bera alt hetta gullið:

– Nú er tað ikki bara eg. Hjá kvinnunum gera spælararnir tað gott og hjá monnunum tað sama, og eg eri bara ein lítil partur av øllum hesum. Men tað er ótrúliga stuttligt at kunna fara heim við fýra gullheiðursmerkjum, segði hann.

– Eg vænti, at hetta kappingarárið verður seint gloymt í Sørvági, nú vit eru fyrsta felag í Føroyum, sum megnar hetta. Og hetta verður í øllum førum standandi sum nakað fyri seg, til onkur annar ger tað sama.

### Óvæntað lætt

Kári Mikkelsen eigur eisini fýra gullheiðursmerki, tí hann hevur verið hjálparvenjari hjá Johan Peturi, umframt at hann eisini hevur spælt við mansliðnum hjá SÍ. Eftir dystin leygardagin var hann eitt sindur bilsin av, at tað heila skuldi vera avgjørt eftir bara trý sett:

– Nú spældu vit tveir fimmsettarar í síðstu viku, so man hevði væntað, at hetta bleiv upp á sama máta. Men tað er fantastiskt, at vit skuldu vinna soleiðis. Vit hava fleiri spælarar, sum ordiliga reistu seg í dag, og tað var tað, sum gjørdi munin. Serliga helt eg, at Emil Mikkelsen spældi heilt fantastiskt og vann allar bóltarnar, segði Kári Mikkelsen.

hil



**Johan Petur á Stongum og Kári Mikkelsen hálsfevndust, eftir at SÍ leygardagin hevði gingið dupultu greipuna til høldar. Báðir eiga nú fýra gullheiðursmerki eftir eitt minniligt kappingarár**

Mynd: Álvur Haraldsen